SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Leiðbeining og góð ráð við nasabløðan

**Við bløðan**:

Set teg upp, eitt sindur framyvir, so blóðið ikki rennur aftur í svølgið.

Snýs nakrar ferðir (eitt sindur harliga) – Nakrar bløðingar steðga av hesum.

Halt fast um nøsina í uml. 10 min., evt. longur.

Royn við knústum ísterningum upp undir góman. Hevur tú protesu, tak yvirmunnin út.

Sit eina løtu, og vita um hetta hevur hjálpt.

Við áhaldandi bløðing, kontakta kommunulækna ella skaðastovu.

**Aftaná viðgerð**:

Ikki eta ella drekka nakað heitt.

Hald frið, ikki bukka teg niður, ella lyfta nakað tungt.

Sit uppi, sov við høgt undir høvdinum.

Ikki roykja, drekka øl, vín ella spiritus.

Eru blóðskorpir í nøsini, skola varisliga við saltvatni (sí uppskrift), ikki “pilka” nøs. Smyr heldur nøsina varisliga við vaseline ella olju.

Hetta skal yvirhaldast næstu 24 tímarnar.

Tekur tú blóðtynnandi – Kontakta lækna.

Við afturvendandi bløðingum, kunnu aðrar kanningar koma uppá tal. Við ov høgum blóðtrýsti, ella um tú ert í viðgerð fyri blóðtrýstið, skalt tú til kontroll hjá egnum lækna.

**Saltvatnssnúsan**:

Kóka ein ½ litur av vatni, og lat 1 tsk. salt í - Lat kølna!

Snúsa uml. 1 spsk. av saltvatni upp í nøsina nakrar ferðir dagliga.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo